Fíggjarmálaráðið

## Avloysarastarv
# Fulltrúi til Fíggjarmálaráðið

**Starvið**
Fyri fulltrúa í Fíggjarmálaráðnum ið skal í barsilsfarloyvi 01. juli 2009 og 7 mánaðir fram, verður søkt eftir avloysara.

Tú kemur at arbeiða við sera fjøllbroyttum uppgávum av ráðgevandi, fyrisitingarligum og analytiskum slagi á teimum økjum, ið ráðið umsitur. Dømir:
- Tú ráðgevir landsstýrismanninum um fíggjar-, skatta- og avgjaldsmál og viðgerð innkomin mál
- Tú fyrireikar uppskot til nýggjar lógir og lógarbroytingar
- Tú loysir tvørgangandi og samskipandi uppgávur
- Tú ger analysur og langtíðarætlanir
- Tú ráðgevir og leiðbeinir aðalráðum og stovnum
- Tú kemur at samstarva við Fíggjareftirlitið í Danmark

**Førleiki**
Vit rokna við, at tú hevur samfelagsvísundaliga útbúgving av hægri lærustovni, so sum cand.polit., cand. jur., cand.oecon. ella líknandi. Vit rokna eisini við, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva í arbeiðsbólkum.

Eisini kann talan verða um lesandi, sum ynskja ein steðg við lesnaðinum. Vit bjóða
- Sjálvstøðugt starv
- Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har tú arbeiðir nógv saman við teimum politisku myndugleikunum
- Starvið er samstundis sera áhugavert við nógvum samskifti úteftir
- Flex-tíð

Arbeitt verður á høgum fakligum stigi, og tí eru sera góðir møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Setanartreytir**
Setunartreytir og løn eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanin fatar um alt Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini aðalráðini.

**Umsókn**
Umsókn saman við CV og møguligum viðmælum skal sendast til:

***Fíggjarmálaráðið***
***Postboks 2039***
***FO-165 Argir***

Freistin at søkja er mánadagin 11. mei 2009 kl. 12.00.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Petur Alberg Lamhauge, fíggjarmálastjóra, á tlf. 35 20 20.

Lýsingin finst eisini á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum: www.fmr.fo. Telduposturin er fmr@fmr.fo

TRAÐAGØTA 39 · POSTSMOGA 2039 · FO-165 ARGIR · TEL: 35 20 20 · FAX: 35 20 25 · FMR@FMR.FO



# Íverkset saman við okkum!

**Ert tú íverksetari ella arbeiðir tú í einum virki við nýskapandi virksemi, so er hetta ein møguleiki at ogna sær vitan um føroysku vinnuframaskipanina.**

**Vinnuframagrunnurin skipar fyri almennum tiltaki, sum hevur til endamáls at kunna um og vísa á møguleikar hjá íverksetarum og nýskapandi virkjum at fáa nýskapan til høldar.**

**Tú fært vitan um:**
- hvussu tú kanst søkja stuðul úr Vinnuframagrunninum
- hvussu tú skalt skipa títt virksemi sum íverksetari
- hvussu tú kanst fáa ókeypis skrivstovutænastur og ráðgeving til nýskapandi virksemi
- hvussu tú kanst fáa íleggjarar og fígging

Tiltakið verður í Norðurlandahúsið hósdagin 14. mai frá kl. 17 til 21.

Tiltakið er ókeypis. Tilmelding fer fram við telduposti til vfg@vfg.fo ella á telefon 311085. Seinasta freist at boða frá luttøku er mikudagin 13. mai kl. 12.

**Skrá:**
Íverksetarastuðul
Hvussu virkar Vinnuframagrunnurin, Bogi Eliasen, ráðgevi
At stovna virki, Árni Ellefsen, Løggildur grannskoðari SPEKT

**Steðgur og Ábit**

Ráðgeving til íverksetarar og nýskapandi virksemi, Steinbjørn í Dali, prosjektleiðari fyri VFG
Bitland nýskapanardepil, Ólavur Gregersen, stjóri í Bitland
Íverksetarahúsið í Klaksvík, Rani Nólsøe, stjóri í Íverksetarahúsinum
Íverksetarar um íverksetarastuðulin og Kleking, Dánjal Jacob Jacobsen, stjóri í Decision3.

**Íleggjarar og bankafígging**
Avbjóðingin hjá íverksetarum at fáa íleggjarar við, Ólavur Gregersen, stjóri í Bitland
SET sum íleggjari, Símun Hammer, stjóri í SET
Framtak sum íleggjari, Gloria Kalsø, forkvinna í Framtak
Bankafígging

Kaffi og høvi at práta við fyrilestrarhaldararnar.

**Netverk**
Undir tiltakinum og aftaná tiltakið er møguleiki at hitta og gera avtalu við tey, sum hava lagt fram.

KREA · TEL 60 80 80

Vinnuframagrunnurin

Vinnuframagrunnurin | Hoyvíksvegur 51 | Postboks 3079 | 110 Tórshavn
Tel 31 27 94 | Faks 31 67 03 | vfg@vfg.fo

**Veitst tú eina góða?**

**Ring til Sosialin tlf 341800**



# Nýtt teoriskeið 15. juni í Vági

**Nýtt teoriskeið til persónbil byrjar 15. juni. Enn eru nøkur pláss eftir**

Um nóg nógv tekna seg, verður eisini R/F skeið – ið ein skal hava fyri at ogna sær koyrikortið aftur, um tað er mist venga rúsdrekkakoyring.

Meldast kann til á tlf. 59 59 58, ella við at senda ein t-post til...

**koyrikort@hotmail.com**

við navni, bústaði og telefon.

**KOYRISKÚLI**
**VIÐ RÓLAND JOENSEN**



sansir.fo

**Sunda kommuna søkir eftir lærarum**
Umsóknarfreist er 12. mei 2009
Les meira á www.sunda.fo

SUNDA KOMMUNA